## Gongur væl í Grønlandi

Hóast prísurin á fleiri fiskavørum og serliga rækjum er fallin, hevur tað ikki fingið so óhepnar avleiðingar fyri grønlendska búskapin, sum ein kundi væntað. Tað sigur formaðurin í Ráðgevandi nevndini viðvíkjandi Grønlandi, Christian Sørensen, við KNR. Professarin sigur, at ein orsøk til, at búskapurin stendur seg so væl, eru teir nógvu framtíðarmøguleikarnir innan námsvinnu og ferðavinnu, men Grønland má leggja dent á útbúgving, sigur hann.



*Grønlendski búskapurin stendur seg væl hóast fellandi rækjuprís (Mynd: KNR)*

## Fogh til USA

Danski forsætisráðharrin er boðin til USA at vitja George W. Bush, forseta. Eftir ætlanini skal Anders Fogh Rasmussen til Texas at vitja amerikanska forsetan síðst í næsta mánað. Eygleiðarar í Keypmannahavn siga, at tað eru bara nakrir fáir ríkis- og stjórnarleiðarar, sum verða bodnir at vitja amerikanska forsetan í Texas, og at innbjóðingin er eitt tekin, um at amerikanski forsetin og danski forsætisráðharrin hava ikki bara politikk at tosa um. Áðrenn hann fer til Crawford í Texas, skal Anders Fogh Rasmussen hitta amerikanskar politikarar í Washington, skrivar JyllandsPosturin.

# Tí er Føroya Kolvetni við í William

**Ein av mest spennandi verkætlanunum, har Føroya Kolvetni luttekur, er William-boringin. Føroya Kolvetni gjørdist partur av hesi váðafúsu boringini í november 2007 eftir eina umbýting av loyvum við Shell**

OLJUVINNA
*Hilmar Simonsen*
*hilmar@sosialurin.fo*

Spurningurin hevur altíð verið, hvussu íðin oljufeløg eru eftir at fremja váðamiklar leitiboringar. Boringar í einum ókendum øki við lítlari jarðfrøðiligari vitan er altíð vágamikil, og hetta er galdandi fyri boringarnar inni á føroyska landgrunninum, har tað í mestan mun er seismikkur, oljufeløgini hava at stuðla seg til. Men vitanin økist so hvørt fleiri brunnar verða boraðir: fyrst Brugdan í 2006, og nú William. Tá oljufeløg fáa leitingarloyvir, er tað vanligt at oljumyndugleikarnir krevja, at feløgini binda seg til at bora brunnar.

William-boringin, sum BP er fyristøðufelag fyri, er neyvan nakað undantak í so máta. Felagið hevði frá fyrstu loyvisrundu bundið seg til at bora ein brunn aftur at tí fyrra, sum varð boraður í landssynningshorninum í 2001. Saman við Shell, Anadarko, og nú eisini Føroya Kolvetni og einum suðurkoreanskum oljufelagi, borar BP Williambrunnin í hesi løtu.

Í november 2007 gjørdist Føroya Kolvetni partur av hesi boring, eftir at hava yvirtikið eina ognarlut á 5 prosent frá Shell.

- Ein av grundunum til at vit eru við í William er ein býtishandil, vit gjørdu við Shell, har vit keyptu okkum inn í loyvir hjá teimum í Noregi og í William, sigur Nils Sørensen, stjóri í Føroya Kolvetni.

Føroya Kolvetni ynskti at fáa lut í nøkrum minni váðafúsum loyvum hjá Shell í norskum øki, men afturfyri keypti Føroya Kolvetni 5 av teimum 20 prosentunum, sum Shell átti í William. William er sum vera man ein boring, har váðin er stórur.

### Sum at býta glansibíløt

Lutirnir sum Føroya Kolvetni yvirtók frá Shell vóru 10 prosent í loyvinum Trym, har gass longu er staðfest, og 10 prosent í leitingarloyvinum Granat – bæði í Noregi.

Síðani hevur eitt suðurkoreanskt felag, STX Energy, eisini keypt ein ognarlut frá Shell í William (tvs. farmað in). Fyri stuttum keypti japanska oljufelagið Cieco seg inn í eitt loyvi hjá Føroya Kolvetni og Eni, har farið verður undir at bora Anne Marie brunnin væntandi í 2009. Eitt annað japanskt oljufelag, Idemitsu, liggur eisini framvið at keypa seg inn í føroysk leitiloyvir.

Cieco keypti seg inn í Anne Marie prospektið í lutfallinum 2:1, tað merkir, at teir rindaðu 2 krónur fyri hvørja krónu, loyvið hevur kostað Føroya Kolvetni og Eni. Hetta kemst av, at verandi loyvishavarar hava tikið allan váðan á seg higartil, samstundis sum teir hava arbeitt við økinum. Nils Sørensen vísir á, at í Noregi verða slíkir býtishandlar (farm in/farm out) ofta gjørdir í lutfallinum 3:1.

- Hetta at selja burtur av sínum, og keypa frá øðrum, er heilt vanligt í oljuvinnuni. Áhugin fyri hesum byggir vanliga á tær strategisku ætlanirnar, sum oljufeløgum hvør í sínum lagi hava, vísir Nils Sørensen á, og leggur afturat:

- Vit minnast frá skúlatíðini, tá genturnar dámdu væl at býta um glansibíløt. Hetta tí at tær sóu okkurt spennandi við glansibílotunum hjá hinum gentunum. Tá oljufeløgini býta um loyvir við hvørt annað, so minnir tað ikki sørt um hetta sama.



*Transocean Rather borar í løtuni William brunnin á føroyskum øki*